# Ingen utom jag




Høvundur og myndprýðari: Sara Lundberg (Svøríki)
Forlag og útgávuár: Natur och Kultur, 2024

Tilnevnd Barna- og ungdómsbókmentavirðaisløn Norðurlandaráðsins 2025

Søgugongd: "Mamman er keiin, og barnið er báturin", sigur barnið, ið spælir á strondini. Barnið loysir knútin, ið er fastur í keiina. Í meðan mamman drekkur kaffi og prátar við ein annan vaksnan, fer barnið á ævintýrferð inn í eina sansaliga og fantasiríka verð í sínum gummibáti. Lesarin fylgir barninum, sum forvitnisliga kannar verðina.

Evni: hugflog, spæl, forvitni, dirvi, sjálvbjargni, barnsins eyga, summar, náttúra, upplivingar

## Samrøða og uppgávur:

### HYGG OG LES saman við teimum yngstu

**Hyggið eftir myndunum saman. Hava tit nakrar yndissíður? Tosið um litirnar í bókini. Hvørjir litir tykjast serliga summarsligir ella ævintýrkendir? Spælið, at tit sigla við gummibáti. Hvagar fara tit? Gerið rørslur og ljóð til myndirnar. Vís barninum, hvussu báturin flytir seg, ella hvussu vatnið ljóðar. Fylgið vatninum og barninum við einum fingri gjøgnum bókina.**

### TEY YNGRU

**1. Hyggið at permuni. Hvat síggja tit? Hvørjum heldur tú, at barnið á myndini hyggur at?**

**2. Hyggið at myndini av strondini. Hvat hevði tú gjørt á eini strond? Hyggið at menniskjunum á myndunum, sum gera ymiskt. Tekna tað, tú hevði ynskt at gjørt á strondini. Gerið eina stóra strondmynd saman.**

**3. Ímynda tær, at tú ert í einum báti, og brádliga kanst fara júst har, tú ynskir. Hvar hevði tú farið? Hvønn kundi tú hugsað tær at hitt?**

### MIÐLINGAR

**1. Í bókini situr barnið í gummibátinum, meðan tað droymir seg burtur. Hevur tú eitt serligt stað, har tær dámar at sita og droyma? Fortel um tað.**

**2. Hygg eftir, hvussu myndprýðarin prýðir síðurnar við vatni í bylgjum. T.d. tá barnið dettur úr bátinum, ella tá regnið kemur í endanum á søguni. Hvussu hevði tú teknað hetta? Royn at tekna ókyrt vatn ella regn. Hvørjar litir og amboð hevði tú valt? Krit, litblýantar ella vatnmáling? Ella ein blanding av øllum? Royn teg fram.**

**3. Barnið í bókini plantar eitt fræ, sum tað hevur fingið á síni ferð. Lærarin kann geva hvørjum barni eitt "gandafræ" (t.d. eitt fræ til eina summarblómu) og lata børnini sáa fræini. Teknið tykkara fantasiblómu. Brúkið bókina til íblástur.**

**4. Um veðrið loyvir tí, er tað eitt gott hugskot at fara útum at mála. Legg til merkis, hvussu ljós og skuggar ávirka huglagið í náttúruni. Dugir tú at fanga tað á eini mynd?**

### TEY STØRRU BØRNINI

**1. Hygg at permuni. Hvat hevði tú viljað sæð, um tú fórt út við gummibáti ein summardag? Skriva eina summaryrking ella ger eina tekning og fortel um hana.**

**2. Barnið í bókini fer á ævintýrferð. Fortel um eina ferð, har tú upplivdi okkurt nýtt, sum tú sjálv/-ur fanst uppá.**

**3. Tríggir skapningar fylgja barninum. Hvør heldur tú, teir eru? Eru tað veruligu vinirnir hjá barninum, ella eru teir fantasivinir? Hví síggja teir út, sum teir gera?**

4. Vel eina síðu í bókini, har eingin tekstur er. Skriva tín egna tekst til myndina. Tosið saman um, hvussu nógvar ymiskar søgur, mann kann skriva til somu mynd.

5. Sara Lundberg hevur myndprýtt nógvar bøkur. Spyr á bóksavninum um tú kanst lána ella bíleggja fleiri av hennara bókum. Hyggið at myndunum saman. Hvat leggur tú til merkis við myndunum? Hvussu heldur tú, tað sær út, har Sara arbeiðir við myndum? Kundi tú ímyndað tær at arbeitt sum myndprýðari?

---

**AÐRAR SPENNANDI BØKUR:**

Glömdagen eftir Sara Lundberg

Joels färger eftir Isela Valve

Olli och Mo eftir Eva Lindström

---

## MÁLBITIN

# "Gummibátur"

| svenskt | danskt | norskt | íslendskt | føroyskt | grønlendskt | finskt | norðursamiskt |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Gummibå | Gummibåd | Gummibåt | Gúmmíbátur | Gummibátur | Gummibådi | Kumivene | Gummefanas |



Fá íblástur til myndabøkur við at fylgja Norðurlendska bókalúkinum á Instagram: @nordiskabokslukaren